# Fólk hildu lítið




**40 ár eru liðin síðani fyrsta psykiatriska deildin lat upp á Landssjúkrahúsinum. At ein deild fyri sinnisveik fólk lat upp, var til gleði fyri mong, meðan onnur funnu stuttleika í at gera gjøldur burtur úr hesum og teimum fyrstu røktarstarvsfólkunum. - Fyri okkum var hetta heimsins besta arbeiðspláss, og tí gjørdu vit nógv burtur úr at greiða fólki frá, hvat okkara arbeiði var, og hvønn týdning tað hevði fyri tey sinnisveiku, siga tær fyrstu sjúkrasystrarnar á deildini**

PSYKIATRISØGA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Tær høvdu eisini sínar orsøkir til at gera hetta eykaarbeiðið, kann ein siga.

Mong fólk høvdu nevniliga millum lítla og onga fatan av, hvat endamálið var við eini psykiatriskari deild í Føroyum. Tey hildu, at hetta var eitt arbeiðið sum lá ímillum eitt fongsul við rimum fyri vindeyguni og eitt vanligt hvíldarheim.

Onnur høvdu lítla virðing fyri arbeiðinum millum tey sinnisveiku, og dugdu ikki við sínum besta vilja at skilja, hví ungar og vælútbúnar sjúkrasystrar vildu arbeiða á einum slíkum staði. Og uppaftur onnur settu spurnartekin við, um tað nú var neyðugt at taka øll hesi svøku fólkini heim til Føroyar og leggja tey inn á eina og somu deild.

– Nei, tað var ikki stuttligt at blíva mobbaður soleiðis, men vit vardu okkara arbeiði bæði við nevi og klóm. Og satt at siga, gekk ikki so øgiliga long tíð, fyrrenn fólk byrjaðu at venja seg við at síggja og møta teimum sinnisveiku fólkunum á gøtuni.

– Hetta var ein hørð tíð, men vit trúðu uppá okkara arbeiði. Og tí hildu vit fram at arbeiða, hóast fólk kanska ristu við høvdinum. Einki kundi tó taka mótið frá okkum!, siga tær tríggjar sjúkrasystrarnar Marin, Margreth og Petry saman við læknaskrivara teirra ta fyrstu tíðina, Tordis.

29. oktober vóru nevniliga liðin 40 ár síðani fyrsta psykiatriska deildin lat upp í Føroyum. Í hesum sambandi hava vit sett hesum fýra kvinnunum stevnu aftur, júst á Deild 1, sum tá æt P21 á Statshospitalinum - Marin Samuelsen, Margreth á Rógvu Niclasen, Petry Olsen og Tordis Johannesen.

## Eitt stórt byggipláss

Oktober mánaður 1969 stendur í minninum sum ein rokmikil mánaður fyri tey fyrstu starvsfólkini á psykiatrisku deildini - sjúkrasystrar og pleygarar. Tey vórðu sett í starv mikudagin 1. oktober, og bert fýra vikur seinni skuldi deildin taka ímóti fyrstu sjúklingunum.

Her var sum vera man nógv eftir at gera, og Margreth minnist sera væl tað fyrsta inntrykkið av sínum komandi arbeiðsplássi:

– Taðvejden, eg komi so aldrin at gloyma fyrstu ferð, eg kom inn á deildina. Uha, tað var sum at koma inn á eitt ordiligt byggipláss. Har var sooo nógv eftir at gera, at eg ivaðist í, um alt fór at blíva liðugt til tíðina.

– Eg meini so við: WC'ini vóru ikki eingang liðug, lítið var gjørt við baðirúmini, glasgongin skuldi eisini riggast til, og her gingu arbeiðsmenn og rokaðust við sítt og vit við okkara arbeiði, greiðir hon frá.

Tey nýsettu røktarstarvsfólkini stóðu kortini ikki hendur í favn og bíðaðu eftir, at alt skuldi gerast liðugt. Tey møttu til arbeiðis hvønn dag klokkan 8 og fóru til húsa aftur átta tímar seinni.

Meðan handverkararnir løgdu hond á seinastu arbeiðini, skipaðu starvsfólkini seg soleiðis, at hvør einstakur teirra fekk eitt ávíst rúm at gera liðugt.

## Teir hugdu eftir okkum

Útgerðin til deildina varð bíløgd og koyrd inn í kjallaran, og hagani vórðu so borð, postalín, sengur og